# Avloysari
## til Dagrøktarskipanina í Gøtu kommunu

Dagrøktin í Gøtu kommunu søkir eftir avloysara at ansa børnum, at byrja beinanvegin ella eftir nærri avtalu. Møguleiki er fyri føstum starvi.

Í Dagrøktarskipanini í Gøtu eru umleið 25 børn, sum øll eru undir 3 ár. Dagrøktararnir eru í løtuni 5 í tali. Dagrøktarskipanin hevur spælistovu, har dagrøktararnir savnast saman við børnunum 1 ferð um vikuna.

**Vit ynskja at tú:**
- hevur góðar og tryggar umstøður at hava børn,
- kanst arbeiða sjálvstøðugt,
- hevur hug at ansa børnum í heimi tínum.

Arbeiðstíðin er millum kl. 7.30 og 17.15.

Lønin og setanartreytir eru sambært sáttmála millum FA og FKA.

Nærri fæst at vita við at ringja á telefon 441832 ella 215012, og tosa við Elin Mikkelsen, dagrøktarleiðara.

Vinarliga send umsóknina til Gøtu Kommunu, stílað »Avloysari til Dagrøktina«, so hon er kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 6. mars 2006.

Gøtu Kommuna



# Farmaleiðir til sølu

Talan er um virksemi í sambandi við landvegis farmaflutning við tilhoyrandi starvsfólkum, akførum, verkstað, amboðum, goymslu v.m.

Útbjóðingartilfar við sølutreytum og nærri upplýsingum um virkið, fæst frá undirritaðu móti rindan av depositum stórt kr. 5.000,-

Viðmerkjast skal at tilboð skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi tann 10. mars 2006 kl. 16.00.

Nærri fæst annars at vita við at venda sær til Annfinn V. Hansen annfinn@advokat.fo ella Djóna Thomassen, djoni@advokat.fo

**Advokatfirma Annfinn V. Hansen**
Bryggjubakki 22, Box 106
FO-110 Tórshavn · Tlf. 359595 · fax 359596
t-postur: advokat@advokat.fo

# Ársaðalfundur í Eysturoyar Tjoðveldisfelag

Ársaðalfundurin hjá Eysturoyar Tjóðveldisfelag verður týskvøldið 28. februar 2006

**kl. 19.30 á Statoilstøðini í Leirvík.**

Skrá sambært lógum felagsins.

**Eysturoyar Tjóðveldisfelag**

**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Heimarøktin*

### Heimarøktin Vágoy/Norðstreymoy
# Heilsuhjálparar

Søkt verður eftir heilsu-/heimahjálpara at arbeiða í Kvívíkar/-og Vestmanna kommunu at byrja 1. apríl 2006 ella skjótast til ber at arbeiða í blandaðum dag- og kvøldvaktum við starvsbrøki 20 tímar um vikuna.

Somuleiðis verður søkt eftir heilsu-/heimahjálpara at arbeiða sum avloysara í Kvívíkar/ og Vestmanna Kommunu at byrja skjótast til ber.

Vit kunna bjóða eitt spennandi starv í eini skipan, ið er í støðugari menning. Eitt starv, har tú bæði fer at virka í tøttum samstarvi við onnur og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.
Uppgávur tínar verða, umframt at veita handaliga hjálp, eisini at veita hjálp til persónliga røkt til heimabúgvandi pensjonistar.
Fyrimunur er, um tú hevur prógv sum heilsuhjálpari ella hevur royndir innan eldrarøkt.
Vit vænta av tær, at tú bæði hevur góð samstarvsevnir og hevur áræði at arbeiða sjálvstøðugt.

Eru spurningar viðvíkjandi størvunum, eru tygum vælkomin at seta tygum í samband við Kristbjørg Toftegaard, varaleiðara, á tlf. 422570.

**Setanar- og Lønarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Heilsuhjálparafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina við setanarstað í Heimarøktini. Tænastustaðurin fyribils er Heimarøktin Vágoy/ Norðstreymoy.

**Umsóknir:**
Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum/ arbeiðsváttanum verður at senda til:

Umsóknarfreistin er 6. mars 2006

**Heimarøktin Vágoy/Norðstreym**
Økisskrivstovan
Fo 370 Miðvágur
Att: Sonja Klein, økisleiðari

## Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 17. februar 2006, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Alistøðina í Nesvík hjá P/F Fiskaaling**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4181**
**Navn:** Sp/f 10/2-2006
**Adressa:** c/o Eddie Hjartvar Joensen 410 Kollafjørður
**Kommuna**: Tórshavnar
**Stovningardato:** 16-02-2006
**Viðtøkudato:** 16-02-2006
**Stovnarar:** Eddie Hjartvar Joensen, 410 Kollafjørður
**Stjórn:** Eddie Hjartvar Joensen, 410 Kollafjørður, (stjóri)
**Grannskoðari:** Sp/f Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen,skrás.grannsk, J. Broncksgøta 16, Box 16, 110 Tórshavn
**Partapeningur:** kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 80.000,00 í ørðum virðum til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka landbúnað og veiðu, virksemi, sum knýtir seg til raksturin av festi og annað virksemi í hesum sambandi, keyp og sølu, grevsturarbeiði umframt aðra tænastuvinnu.
**Roknskaparár:** 01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 16.02.2006 - 31.12.2006

Skráseting Føroya tann 17. februar 2006

# Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86 · 100 Tórshavn
Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
herman@post.olivant.fo

**Vit útinna allar uppgávur í sambandi við eina jarðarferð frá byrjan til enda**

- Eisini sangir, blómur og kransar
- Vit syrgja fyri sangarum *(í Tórshavn)*
- Vit framleiða okkara egnu kistur *(veita um alt landið)*
- Skipa fyri líkflutningi til og úr Føroyum
- Skipa fyri líkbrenning
- Hjá okkum kanst tú bestemma **tín síðsta vilja**

Sosialurin 341800

# Sosialurin
www.sosialurin.fo